

## Eitt kvøld fyri pør

Komandi mánakvøld kl 19:30 verður skipað fyri einum kvøldi fyri pør í kirkjukjallaranum í Christianskirkjuni. Fyrst verður hildin ein stuttur fyrilestur um, hvussu kann eitt parlag varðveitast í einum strongdum gerandisdegi. Síðani verður ein filmur, ið ber heitið »Fireproof« vístur.

Filmurin snýr seg um eitt par, ið hevur trupulleikar í hjúnalagnum. Ein sera grípandi og gevandi filmur. Eisini verður ein góður drekkamuður at fáa.

– Øll eru vælkomin, siga fyrireikararnir.

## Dýrari olja




Prísurin á olju og bensini er enn eina ferð kvinkaður upp- eftir.

Í gjár hækkaðu oljufeløgini søluprísirnar.

Bensin kostar nú 9,81 krónur liturin, diesel 8,66 krónur liturin, og 1000 litar av gassolju 7.100 krónur.




*Per Andreasen er triðja ættarliði í handilinum hjá Johannes Andreasen – keypmanninum úti í Grønlandi í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Familjufyritøka fer í søguna

**HANDIL Inn-handlarnir hava keypt handilin Johannes Andreasen á Grønlandsvegnum í Havn**

Randi Jacobsen

Tað var í 1950, at Johannes Andreasen læt upp matvøruhandil úti í Grønlandi í Havn. Tá ið hann legði frá sær, tók sonurin, Arne Andreasen yvir, og tey seinastu árini hevur abbasonurin Per og kona hansara Gurli rikið handilin.

Men nú hava tey hug at royna okkurt annað, sjálvt um tey hava trivist væl í handlinum.

– Eg royndi at selja og fekk ein góðan keypara, sigur Per Andreasen.

Handilin, sum vanliga gongur undir navninum Keypmaðurin í Grønlandi í Havn, verður fimti Inn-handilin í landinum. Tann triði í Havn.

Tað verður um mánaðarskiftið, at Inn yvirtekur handilin í Grønlandi.



*– Eg fái makk av hesum religiøru - teimum, sum taka patent upp á Gud. Eg er eri ikki nakar ateistur, men eg taki fullkomiliga avstand frá hesum, sum taka pantent upp á Gud. Sum ein segði: »Eg havi einki problem við Gudi, men tað eru hansara fan-klubbum, sum eg havi problemir við...«*

*Ingi Sørensen, í »Fólksins rødd«*

# Smyril misti olju

**Mikukvøldið misti Smyril einar 1000 litrar á sjógv á Drelnesi, og í morgun sást olja á sandinum í Trongisvági**



Randi Jacobsen

Hósmorgunin fekk politiið í Suðuroynni boð um, at strandferðaskipið Smyril hevði mist nakað av olju á sjógv kvøldið fyri.

Enn er ikki heilt greitt, hvussu óhappið hendi. Tað var í hvussu er ikki í sambandi við bunkring, men helst tá ið spillolja skuldi savnast saman í ein tanga.

Sløkkiliðið, Landsverk og onnur tóku oljuna uppaftur, men í morgun sást olja á sandinum í Trongisvági, og har vórðu so sperringar lagdar út.




*Hóskvøldið fara kendu sangararnir Árni og Marnar at syngja í Frelsunarherinum í Havn*

# Syngið við kvøld í Frelsunarherinum

**SANGUR Hóskvøldið 24. februar kl. 20 verður »Syngið við kvøld« við kendu sangarunum Árna og Marnar, sum syngja fyri. Hjálpin frá Heimaforbundinum fer til nýggja verkætlan í Paraguay**

Tíðindaskriv

Í ár stuðla vit eini verkætlan í Paraguay, sum Ruth Bente og Tore Paulsen majorar úr Noreg eru leiðarar fyri. Verkætlanin er fyri kvinnur og børn, sum liva í tí størsta størsta fátækradømi í landinum. 100 kvinnur og 100 ung fáa møguleikan at læra til frisørar, seyma klæðir, brodera, veva, gera mat o.a.

Somuleiðis læra tey at hjálpa, bæði teimum sjálvum, og at hjálpa til í nærumhvørvinum, tá tað er harðskapur í heimunum, kynsligur harðskapur og narkotikamisbrúk, sum er so ómetaliga stórt í Paraguay.

Ruth Bente sigur, at tey upplivað, at børn mugu bidda hvønn dag og langt út á náttina fyri at fáa mat til familjuna. Tey vita um tað ígjøgnum klinikkina hjá norska Frelsunarherinum Tekokatu í San Lorezo, har tey hava samband við hesi børn, og hvar hesi børn verða útsett fyri kynsligum ágangi. Bæði kvinnur og ung, sum vit hjálpa, fáa tilboð um viðgerð fyri at koma ígjøgnum hesi upplivilsi.

Ígjøgnum okkara missiónsgávu hjá Heimaforbundinum eru vit við til at stuðla og hjálpa mongum menniskjum til eitt betri lív. Kvøldið í Frelsunarherinum í Havn verður skipað sum syngið við kvøld við drekka í steðginum og andakt.